

## Fólkafundur í Gøtu

Fólkafundur verður í Gøtu sunnudagin 7. juni - seinrapartin kl. 3. Hann verður hildin í Norðragøtu, við standmyndina av Tróndi í Gøtu. Skráin er: Sálmurin "Givnir eru einglar góðir" verður sungin. Gunnhild Dahl Niclasen, lesandi, flytir fram røðu. Carl Jóhan W. Jensen, rithøvundur, ber fram yrkingar. Kári á Rógvu, løgtingsmaður, flytir fram røðu. Lív Næs og Niels Midjord syngja og spæla. Annika Olsen, landsstýriskvinna, flytir fram røðu. Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, flytir fram røðu. Tjóðsangurin verður sungin. Møguleiki er fyri at síggja fornminnini í hesi søguligu bygd, og húsini hjá Gøtu Fornminnisfelag vera opin undir og eftir fólkafundin, sigur Jóanes Johannesen vegna fyrireikararnar.

# Hótta við at leggja allan fiskiflotan

**- Fara politikararnir at pilka við sjómannafrádráttin og inntøkutrygdina hjá fiskimonnum fyri at minka hallið á fíggjarlógini, verður allur flotin lagdur við brestin, ávarar formaðurin í Fiskimannafelagnum**

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er stórur vandi fyri verkfalli í øllum fiskiflotanum.

Tað staðfestir Jan Højgard, formaður í Føroya Fiskimannafelag.

Nú samgongan arbeiðir undir hátrýsti fyri at leggja fíggjarlógina fyri næsta ár til rættis, er boðað frá umfatandi inntrivum fyri at minka um hallið hjá landskassanum.

Í hesum sambandi hava politikararnir eisini nevnt møguleikan at avtaka ella skerja tann serliga skattalættan, sum sjómenn fáa og teir hava eisini nevnt, at tað kann verða neyðugt at pilka við minstulønina og aðra inntøkutrygd.

- Gera teir tað, spæla teir við eld, ávarar formaðurin í Fiskimannafelagnum.

### Standa fast

Jan Højgaard sigur, at í nevndini í Fiskimannafelagnum hava tey tosað um hesi viðurskifti og har er semja um, at felagið fer ikki at lata tað um seg ganga, at inntøkuviðurskiftini hjá fiskimonnum verða skerd.

- Tí er tað alt, sum talar fyri, at verður pilka við okkara inntøkumøguleikar, verður flotin lagdur við brestin.

Hann sigur, at hetta er nevndin samd um, hóast endalig avgerð ikki er tikin.

Men í hansara hugaheimi er tað einasta, sum manglar, at nevndin tekur eina formliga avgerð um at leggja flotan og boðar frá avgerðini, tí semja er í nevndini um tað.

Og tað sigur hann, fer at henda nakað skjótt.

Sjálvur blunkar Jan Højgaard ikki við at leggja flotan, verður pilkað við sjómannafrádráttin og inntøkutrygdina.

- Alt annað vildi verið løgið, staðfestir hann.

Hann leggur afturat, at Fiskimannafelagið hevur fingið áheitan frá limunum um at standa fast í hesum máli og tí heldur hann, at felagið kann ikki slaka.

### Landið á heysin

Jan Højgaard sigur, at arbeiðshugurin tikin frá fiskimonnum, so at teir rýma av skipunum, fer tað at koyra landið á heysin.

- Sum ábyrgdarfullir borgarar í hesum landi kunnu vit lata slíkt um okkum ganga.

- Vit hava bara sjógvin á at líta og verður skattafrádrátturin skerdur og inntøkutrygdin lækkað, ivist eg ikki í, at skipini missa manningarnar.

Jan Højgaard ivast ikki í, at hendir nakað við inntøkuviðurskiftunum, fara nógvir fiskimenn bara í onnur lond at sigla, ella bara fara teir í land, tí tað fer at loysa seg líka væl sum at sigla.

Hann vísir á, at prísirnir eru falnir so nógv, at hesi bæði seinastu árini er lønin hjá nógvum fiskimonnum farin niður í helvt.

- Eg havi sæð onkra uppgerð, har hýran fyri ein túr upp á eina góða viku, hevði verið 15 krónur um so var, at ongin inntøkutrygd var, og tað sigur seg sjálvt, at slíkt tímir ongin, tí tað er ikki fyri arbeiðshandskar, sigur Jan Højgaard.



*Ongin endalig avgerð er tikin, men nevndin í Fiskimannafelagnum er samd um, at fara politikararnir at pilka við sjómannafrádráttin og inntøkutrygdina, verður allur flotin lagdur, sigur Jan Højgaard og hann væntar, at ein fráboðan um hetta kemur heilt skjótt*

# Manningin rýma av skipunum

**Seta politikarar tiltøk í verk, sum fara at skerja inntøkutrygdina hjá fiskimonnum, ivast formaðurin í Reiðarafelagnum ikki í, at nógvir mans taka til rýmingar av føroyska fiskiflotanum**

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Fara politikararnir at skerja sjómannafrádráttin og at gera inntøkutrygdina verri, mugu vit rokna við, at nógvir mans rýma av føroyska fiskiflotanum.

Tað ivast Viberg Sørensen, formaður í Reiðarafelagnum, ikki í.

Hann sigur, at longu sum støðan er nú, er tað tórført hjá fleiri skipabólkum at fáa manning.

Verður tað so gjørt upp aftur minni hugaligt at fara til skips, er stórur vandi fyri, at bikarið flýtur yvir og menninir og so stinga teir av.

Viberg Sørensen sigur, at hjá øllum húkaflotanum og garnaflotanum er tórført at manna skipini og verður inntøkan skerd enn meiri, meiri, verður onki at gera.

Viberg Sørensen staðfestir, at hetta síðsta árið er miðal avreiðingarprísurin hjá einum línuskipið farin niður í helvt og tað sæst tilsvarandi aftur í inntøkunum hjá manningunum

- Verða so tær skipanir skerdar, sum stuðla uppundir hesar manningar, verður grundarlagið tikið undan allari skipanini, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum.



*Verða tær skipanir skerdar, sum stuðla upp undir inntøkuna hjá fiskimonnum í hesum døgum, verður grundarlagið tikið undan allari skipanini, staðfestir Viberg Sørensen, formaður í Reiðarafelagnum*